# Starvið sum sløkkiliðsleiðari

**á sløkkiliðsstøðini hjá Klaksvíkar Kommunu er við hesum leyst at søkja.**

**Starvið/ábyrgd:**
Sløkkiliðsleiðarin hevur tilvísing til brunanevndina og býarverkfrøðingin og hevur ábyrgdina av sløkkiliðsstøðini og liðnum, og øllum virksemi, sum verður gjørt út frá sløkkiliðsstøðini.
Tann, ið settur verður, skal rokna við møguligum bygnaðarbroytingum, sum m.a. kunnu føra til fulltíðarstarv seinni.

**Høvuðsuppgávurnar:**
Uppgávurnar hjá sløkkiliðsleiðaranum eru sera fjølbroyttar. Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:
- gera fíggjarætlanaruppskot fyri íløgu og árligan rakstur
- umsita og luttaka í vaktarskipanini
- hava eftirlit við allari útgerð á støðini
- umsita brandpostar, skorsteinar o.a.
- umsita kalliskipanina hjá sløkkiliðsmanningini
- venjingar við sløkkiliðsmanningini
- skipa fyri útbúgving av sløkkiliðsmanningini

**Eginleikar/førleikar:**
Neyðugt er, at tú:
- hevur viðkomandi handverkaraútbúgving
- kanst vera á støðini innan 5 min. frá fráboðan
- hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg.
- hevur víðkað fyrstuhjálparprógv
- hevur prógv frá Statens Brandskole sum innsatsleiðari
- hevur heilsuváttan fyri sløkkiliðsfólk
- hevur nøktandi revsiváttan
- hevur áræði, ert arbeiðssamur og røkin
- hevur góð samstarvsevni, ert opin og fyrikomandi og
- hevur telduførleika á grundstøði

Til ber at útvega sær umrøddu prógv í fyribilsstarvi, ið er hægst 1 ár, tá støða til endaliga setan verður tikin.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður at seta skjótast tilber. Lønin verður sambært lønaravtalu millum Klaksvíkar kommunu og Klaksvíkar Sløkkilið.

*Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til býarverkfrøðingin ella býráðsskrivaran, tlf. 410000.*

**Umsóknir**
saman við prógvum, møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

Klaksvíkar Býráð
Postsmoga 2
700 Klaksvík

og skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi tann 27. apríl 2004.**

**Klaksvíkar Býráð**
**tlf. 410000**
**fax 410001**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## ÚTBJÓÐING

Tórshavnar kommuna bjóðar hervið um- og útbygging av Kollafjarðar skúla út í almennari arbeiðstøku.

Arbeiðið umfatar at útbyggja skúlan við tilsamans umleið 950 fermetrum, umframt umbyggingar av verandi skúla.

Byggingin verður boðin út í fakarbeiðstøkum:

**A. Inniloking**

**B. Gólvarbeiði**

**C. Málaraarbeiði**

**D. HVS- og ventilatiónsarbeiði**

**E. El-arbeiði**

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá MAP Arkitektum á tlf. 351900 innan 5. apríl móti veðhaldi á 2.000 kr, sum verður at gjalda á konto í Føroya Banka nr. 6460 168.128.3.

Lisitatiónin verður fríggjadagin 14. mai kl. 14 í býráðssalinum. Tey, sum boðið hava, kunnu vera hjástødd, tá ið boðini verða latin upp.

**Høvuðsráðgevi og projektleiðsla:**

MAP Arkitektar sp/f, Niels Finsens gøta 31, FO 100 Tórshavn.

SNARSKIVAN

# Handilshøli í Vágum til leigu

Góð og kundavinarlig handilshøli til leigu.

Hølini standa væl fyri og eru í góðum handilsumhvørvi.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at skriva til:

**Sosialurin**
**Box 76**
**110 Tórshavn**
**Bill. mrk. 732**

# Frá Heilsuhjálparafelag Føroya!

Ársaðalfundur felagsins verður í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, Tórshavn, leygardagin tann 24. apríl kl. 12.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

# Frá Miðvágs Arbeiðarafelag

Aðalfundurin verður leygardagin 17. apríl kl. 16.00 í húsum felagsins.

**Nevndin**

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

Skrivstovan er stongd frá 2. apríl til 13. apríl, báðir dagar íroknaðir.

**Nevndin**

## Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
**FO-700 Klaksvík**

# Ljósmóðir

Eitt starv sum ljósmóðir er leyst til setan 01.06.2004 ella eftir nærri avtalu.

Samstundis verður søkt eftir frítíðaravloysara frá 01.06.04 til 31.08.04.

Til starvið er knýtt vakt frá heimi.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Ljósmøðrafelag Føroya.

Nærri upplýsingar um starvið fæst á lønarskrivstovuni telefon 455463 lokal 125.

Umsókn við avriti av prógvi, autorisation og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Klaksvíkar Sjúkrahús,**
Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 30.04.04.

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sosialráðgevi

**Á Medisinska deplinum** er hálvtíðarstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja fyri sosialráðgeva í farloyvi til setan 1. mai 2004 til 30. apríl 2005 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum sosialráðgevi við eini breiðari vitan
- góður førleiki at orða seg bæði skrivligt og munligt
- evni til at samarbeiða tvørfakligt

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jón á Steig, leiðandi yvirlækna, telefon 304500, lokal 6103.

Umsóknarfreistin er 20. apríl 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Flag til sølu

170 m² av góðum flagi til sølu. Liggur á plattum.

**Grækaris Joensen,**
**Kvívík, tlf. 212265**




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3751
**Navn:** Sp/f Súlan
**Adressa:** Gerðisvegur 6, 416 Signabøur
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 31.03.2004
**Viðtøkudato:** 31.03.2004
**Kapitalur:** Kr. 81.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 81.000,00 til kurs kurs 100.
**Stovnarar:** Súsanna Svartá Wardum, Gerðisvegur 6, 416 Signabøur og Frida Petersen, Hørgeshlið 20, ÍS- 105 Reykjavík.
**Stjórn:** Eyðstein Wardum, Gerðisvegur 6, 416 Signabøur.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 31.03.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at fáast við fiskiskap og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 31. mars 2004*

*Kristin Balle*

i



# Framsýning
## Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

**Framsýning av handaligum næmingaarbeiði verður í ár bæði á Eysturskúlanum og í Müllers Pakkhúsi**

| | | |
|---|---|---|
| **Eysturskúlin:** | **Leygardagin 3. apríl** | **kl. 14 - 19** |
| | **Sunnudagin 4. apríl** | **kl. 14 - 19** |
| **Müllers Pakkhús:** | **Leygardagin 3. apríl** | **kl. 14 - 19** |
| | **Sunnudagin 4. apríl** | **kl. 14 - 19** |

**Kvøldskúlanæmingar skipa fyri kaffisølu og tombola.**

TÓRSHAVNAR KVØLD- OG UNGDÓMSSKÚLI

# HALDIÐ SOSIALIN

**400,-** um ársfjórðingin
- sparið **380,-** í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Postnr.: ____________
Bygd/býur: ____________
Telefon nr.: ____________
Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn